# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 27-03-2024

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024

(Dagførdar kvotur og felagskvota)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 180 frá 22. desember 2023 um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2 verður "400.000 tons" broytt til: "543.483 tons".

**2.** Í § 2 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Afturat kvotuni í stk. 1 verða 2.400 tons av svartkjafti, ið ikki vórðu fiskað í 2023, flutt til at verða fiskað í 2024."

**3.** Í § 3, stk. 1 verður "304.500 tons" broytt til: "447.983 tons".

**4.** Í § 3, stk. 2 verður "263.500 tons" broytt til: "394.787 tons".

**5.** Í § 4, stk. 1, 1. pkt. verður "197.625 tons" broytt til: "263.490 tons".

**6.** Í § 4, stk. 4 verður "197.625 tonsini" broytt til: "263.490 tonsini".

**7.** Í § 6, stk. 1, 1. pkt. verður "26.877 tons" broytt til: "40.268 tons".

**8.** Í § 7, stk. 1, 1. pkt. verður "34.000 tons" broytt til: "46.196 tons".

**9.** Í § 8 verður "39.998 tons" broytt til: "58.428 tons".

**10.** Aftan á § 8, men áðrenn yvirskriftina yvir § 9, verður sett:

"**§ 8 a.** Í 2024 verða 35.000 tons av svartkjafti latin sum felagskvota við hámarki til eigarar av fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum í 2024 hava rætt at fiska svartkjaft. Hámarkið hjá hvørjum fiskifari er 2.500 tons. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.
*Stk. 2.* Fiskifør, sum bara hava tillutaða kvotu, latin til vinnuligar royndir og verkætlanir á landi sambært § 4 í kunngerð um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, fáa ikki lut í kvotuni sambært stk.1.
*Stk. 3.* Fyri at fáa fiskiloyvi sambært stk. 1, skal egin árskvota, tillutað í 2024 sambært § 4 ella kvota av nøgdunum í §§ 6-8 vera fiskað, samanber tó stk. 2, 2. pkt. Somuleiðis

skal flutt restkvota frá 2023 til 2024 og avhend kvota í 2024 vera fiskað.
*Stk. 4.* Eru líkindi fyri, at kvotan í stk. 1 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin broyta ella taka burtur hámarkið.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, dagfesting

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen